# Býráðsfundur 30.09.2024

**<u>Býráðsfundur 30.09.2024 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | Avboð |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 76/2024 – Ársroknskapir hjá Bygdasavninum og Fornminnisfelagnum | ALMENT |
| Mál nr. 77/2024 – Leinging av Høganesvegnum | ALMENT |
| Mál nr. 78/2024 – Byggiloyvi til tvíhús matr. nr. 474m | ALMENT |
| Mál nr. 79/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki matr. nr. 556 | ALMENT |
| Mál nr. 80/2024 – Ársroknskapur hjá Kongshavnar Havn | ALMENT |
| Mál nr. 81/2024 – Reguleringar og eykajáttanir – Nes kommuna | ALMENT |
| Mál nr. 82/2024 – Fíggjarkarmur 2025 | ALMENT |

Borgarstjórin bað um loyvi at seta eitt mál á skrá afturat:

| | |
|---|---|
| Mál nr. 83/2024 – Íbúðarverkætlan Undir Høganesi | ALMENT |

**<u>Mál nr. 76/2024 – Ársroknskapir hjá Bygdasavninum og Fornminnisfelagnum ALMENT</u>**

<u>J.nr.: 2101-1-2024</u>

Ársroknskapirnir hjá Bygdasavninum og Fornminnisfelagnum eru sendir Nes kommunu.

**Ársroknskapur 2023 - Bygdasavnið**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Inntøkur | **345.366** | **284.816** |

| | | |
|---|---|---|
| Hølisútreiðlsur | - 108.579 | - 123.711 |
| Fyrisitingarútreiðslur | - 9.801 | - 17.484 |
| Gripir og fornminni í alt | - 224 | - |
| Studningsgevandi íløgur | - 218.326 | - 23.338 |
| Útreiðslur í alt | **- 336.930** | **- 164.533** |
| | | |
| Úrslit áðrenn rentur | 8.436 | 120.283 |
| Rentur | - 43 | - 1.257 |
| | | |
| Ársúrslit | **8.393** | **119.026** |

**Fíggjarstøða pr. 31.12.2023**

| | | |
|---|---|---|
| Materiellur útbúnaður | 220.200 | 220.200 |
| Áogn | 3.021 | 2.565 |
| Innistandandi | 292.647 | 293.764 |
| Aktiv í alt | **515.868** | **516.529** |
| | | |
| Eginogn primo | 504.475 | 385.449 |
| Ársúrslit | 8.393 | 119.026 |
| Eginogn íalt | **512.868** | **504.475** |
| | | |
| Onnur skuld | 3.000 | 12.054 |
| | | |
| Passiv í alt | **515.868** | **516.529** |

**Ársroknskapur 2023 - Fornminnisfelagið**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Inntøkur | **5.080** | **4.720** |
| | | |
| Útreiðslur | **- 13.116** | **- 11.411** |
| | | |
| Úrslit áðrenn rentur | - 8.036 | - 6.691 |
| Rentur | 4 | - 1.641 |
| | | |
| Ársúrslit | **- 8.032** | **- 8.332** |

**Fíggjarstøða pr. 31.12.2023**

| | | |
|---|---|---|
| Innistandandi | 196.843 | 197.875 |
| Aktiv í alt | **196.843** | **197.875** |
| Eginogn primo | 195.128 | 203.460 |
| Ársúrslit | - 8.032 | - 8.332 |
| Eginogn íalt | **187.096** | **195.128** |
| Onnur skuld | 9.747 | 2.747 |
| Passiv í alt | **196.843** | **197.875** |

**Á fundi dagfest, tann 17.09.2024, tók Mentanarnevndin roknskapirnar til eftirtektar.**

**Á fundi dagfest, tann 23.09.2024, tók Fíggjarnevndin roknskapirnar til eftirtektar.**

**Býráðið samtykti einmælt at taka roknskapirnar til eftirtektar.**

**Mál nr. 77/2024 – Leinging av Høganesvegnum ALMENT**
J.nr.: 1204-15-2024

Nes kommuna hevur biðið um undirhondsboð frá Falkon og frá RTS uppá at leingja Høganesvegin. Tilboðini komu inn tann 11.09.2024.

Sí. viðløgdu skjøl og kostnaðarmetingina frá LBF

LBF kemur við soljóðandi tilmæli:

Tilboðini eru rættuliga jøvn, og kostnaðarmetingin á sama støði, og tí kann sigast, at talan er um marknaðarprísir. Tí verður mælt til at taka upp samráðingar við Falkon.

Í hesum samráðingum eiga nøgdirnar at verða endurskoðaðar, sum Teknistovan hevur upplýst á teirra tekningum. Eisini er spreingiøkið víðkað 440 m2 eystureftir síðani, og hetta førir til ávísar meirnøgdir. Uppmátingar eru gjørdar við dronu, at brúka sum grundarlag til endurskoðan av nøgdunum, umframt til at neyvteknað leingjan av vegnum og økinum, sum er teknað á skitsustøði.
Tá ber til hjá arbeiðstakaranum, at arbeiða við maskinstýring í landskoordinatum, so at gjørt arbeiði fer at samsvara betur við tekningarnar/ætlanina.

Í sambandi við samráðing um arbeiðstøkusáttmála, verður mælt til at umrøða nærri:

- Hvørjar maskinur Falkon hevur tøkar til arbeiðið.

- Arbeiðs og tíðarætlan.
- Krøv til maskinstýring.
- Spreingiháttur og krøv.
- Dygdarstýring og arbeiðstakarans egna eftirlit.
- Skipan av arbeiðsplássi og grótgoymslu.
- Gjøgnumgongd av nøgdarjavnvág og heildarkostnaði.

Mælt verður eisini til, at Nes kommuna umframt setir pening av til ókendar útreiðslur, trygging, eftirlit og onnur ynskir í hesum sambandi.

**Á fundi, tann 19.09.2024, mælir Tekniska nevnd til at Nes kommunu tekur upp samráðingar við Falkon og at málið verður endaliga avgreitt á komandi býráðsfundi um tilmæli frá LBF er um tað.**

**Á fundi, tann 23.09.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við Teknisku nevnd, og at Nes kommunu tekur upp samráðingar við Falkon, og at málið verður endaliga avgreitt á komandi býráðsfundi um tilmæli frá LBF er um tað.**

Samráðingar hava síðani verið millum Nes kommunu og Falkon. LBF hevur staðið fyri samráðingunum vegna Nes kommunu.
Tað eyðnaðist at semjast um ávísar broytingar av eindarprísum soleiðis, at LBF mælir til at skriva arbeiðstakarasáttmála við Falkon vísandi til viðløgdu skjøl.

Kostnaðurin fyri arbeiðið verður íalt áleið kr. 3.4 mió. kr, tá er kosstnaður fyri ráðgeving, projektering, eftirlit, trygging o. a. við.

**Býráðið samtykti einmælt at taka av tilboðnum frá Falkon, vísandi til tilmælið frá LBF.**

**Mál nr. 78/2024 – Byggiloyvi til tvíhús matr. nr. 474m ALMENT**
J.nr.: 1201-27-2024

Í teldubrævi dagfest, tann 14.07.2024, søkir Skákið um byggiloyvi til tvíhús á matr. nr. 474m á Lýðarsvegi 30. Byggingin er ætlað sum tvíhús, við loddrættari bruna sundurdeiling á miðjuni - tvær búeindir í tveimum hæddum báðurmegin miðdeilingina.

Húsini eru 16 x 7,5m og í tveimum hæddum, byggistigið 17,4 % og nýtslustigi góð 35%, ið lýkur treytirnar í byggisamtyktini.

Somuleiðis eru viðurskifti ss. parkering o.o. viðurskifti lokin.

**Á fundi, tann 19.09.2024, mælir Tekniska nevnd til játta byggiloyvi treytað av at øll teknisk viðurskifti verða nágreinað.**

**Dakko Petersen var úti undir viðgerðini.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Dakko Petersen og Rannvá í Túni Petersen vóru úti undir viðgerðini.**

**Mál nr. 79/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki matr. nr. 556 ALMENT**
J.nr.: 1205-15-2024

Olgar Hansen søkir um at fáa uppískoytisstykki burturav matr. nr. 508 at leggja uppí matr. nr. 556. Sí viðhefta kort.

Talan er um part av stykkinum, ið liggur undir sama matrikkulnummari báðumegin vegin í Láarbø.

**Á fundi, tann 19.09.2024, mælir Tekniska nevnd til at viðmæla keypinum av uppískoytisstykki.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 80/2024 – Ársroknskapur hjá Kongshavnar Havn ALMENT**
J.nr.: 1107-1-2024

Ársroknskapurin hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá kommununi.

| **Rakstrarroknskapur** | **Nota** | **Ætlan 2023** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|---|---|
| Havnagjøld | 1 | 1.750.000 | 1.724.222 | 1.711.433 |
| **Inntøkur Brutto** | | **1.750.000** | **1.724.222** | **1.711.433** |
| Uppkrevingarkostnaður | 2 | -437.500 | -431.056 | - 427.858 |
| **Inntøkur netto** | | **1.312.500** | **1.293.167** | **1.285.575** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fyrisiting | 3 | -115.700 | -105.880 | - 102.465 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | | -3.300 | -3.755 | - 2.555 |
| Marknaðarføring | | - 90.000 | -270.000 | 0 |
| Umhvørvi (Ljóðdálking) | | 0 | 0 | 0 |
| Fishing for litter | | 0 | 0 | 0 |
| Rudding | | - 90.000 | - 70.000 | - 90.000 |
| **Úrslit áðrenn rentur** | | **1.013.500** | **843.531** | **1.088.555** |
| Rentuinntøkur og tílíkt | | 0 | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur | | - 22.000 | -56 | - 18.722 |
| **Ársins úrslit** | | **991.500** | **843.475** | **1.069.833** |

**Fíggjarstøða**

| | | **31.12.2023** | **31.12.2022** |
|---|---|---|---|
| Áogn | | 419.507 | 368.695 |
| Tøkur peningur | 4 | 4.387.619 | 3.293.203 |
| **Ogn í alt** | | **4.807.127** | **3.661.898** |
| Eginpeningur | | 4.499.111 | 4.352.371 |
| Goldið út av inniogn | 5 | 0 | - 696.736 |
| **Eginpeningur í alt** | | **4.499.111** | **3.655.635** |
| **Skuld í alt** | | **308.016** | **6.263** |
| **Eginpeningur, skuld og avsetingar í alt** | | **4.807.127** | **3.661.898** |

**Á fundi, tann 23.09.2024, tók Fíggjarnevndin undir við roknskapinum hjá Kongshavnar Havn.**

**Býráðið samtykti einmælt at góðkenna ársroknskapin 2023 hjá Kongshavnar Havn.**

# Býráðsfundur 30.09.2024

**Mál nr. 81/2024 – Reguleringar og eykajáttanir – Nes kommuna ALMENT**
J.nr.: 1107-4-2024

Umsitingin hevur gjøgnumgingið játtanir til rakstur og íløgur og metir, at tørvur er á fylgjandi reguleringum og eykajáttanum fyri 2024.

**Játta íløgur:**
§ 4 Útiøkið í skúlanum 400.000
§ 5 Skýlið seinkað, flyta part av játtan til 2025 -700.000
§ 6 Byggibúning Regnavegur 2.681.000
§ 6 Gøta til Talvfelagið/Kvinnuhúsið 50.000
§ 6 Jarðarkeyp -50.000
§ 6 Reinsiverkið, teknisk flyting 450.000
§ 7 Tofta Havn, grótkoyring broytt til byggibúning -2.473.000
Í alt: 308.000

**Játta rakstur:**
§ 1 Bíðiløn 55.000
§ 3 Starvsfólkakostnaður Frítíðarskúlin 126.000
§ 4 Blokkur 34.000
§ 6 Reinsiverkið, teknisk flyting til íløgur -450.000
§ 7 Grind 50.000
I alt: -135.000

**Rentur v.m.**
§ 20 Rentustuðul -200.000
§ 20 Rentuútreiðslur 235.000
Í alt: 35.000

**Fíggjarnevndin mælir til, at í alt kr. 308.000 verða játtaðar til íløgur, kr. -135.000 í alt verða játtaðar eyka til rakstur og í alt kr. 35.000 játtaðar eyka til rentuútreiðslur og rentustuðul. Eykajáttan á í alt kr. 208.000 verður fíggjað við, at tikið verður av tøkum peningi.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 82/2024 – Fíggjarkarmur 2025 ALMENT**
J.nr.: 1107-5-2024

**Ásetan av fíggjarkarmi fyri 2025 hjá Nes kommunu**

# Býráðsfundur 30.09.2024

| | | 2025 | | 2024 v/eykaj. | | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §20 Kommunuskattur | tkr. | 68.068 | tkr. | 64.256 | tkr. | 3.811 |
| §20 Húsaleiguskattur | tkr. | 15 | tkr. | 5 | tkr. | 10 |
| §20 Felagsskattur | tkr. | 1.800 | tkr. | 1.500 | tkr. | 300 |
| §20 Eftirlønargjøld | tkr. | 14.965 | tkr. | 13.530 | tkr. | 1.435 |
| § 20 Tøkugjald | tkr. | 15 | tkr. | 0 | tkr. | 15 |
| §20 DIS, FASa v.m. | tkr. | 2.876 | tkr. | 2.770 | tkr. | 106 |
| **Inntøkur í alt** | **tkr.** | **87.739** | **tkr.** | **82.062** | **tkr.** | **5.677** |
| | | | | | | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | tkr. | 7.401 | tkr. | 7.236 | tkr. | 165 |
| §2 Almanna- og heilsumál | tkr. | 28.462 | tkr. | 25.553 | tkr. | 2.453 |
| §3 Børn og ung | tkr. | 15.725 | tkr. | 15.977 | tkr. | -317 |
| §4 Undirvísing | tkr. | 5.340 | tkr. | 5.129 | tkr. | 211 |
| §5 Mentan og frítíð | tkr. | 6.030 | tkr. | 5.904 | tkr. | -944 |
| §6 Teknisk mál | tkr. | 7.972 | tkr. | 7.820 | tkr. | 152 |
| §7 Kommunal virki | tkr. | 4.095 | tkr. | 3.846 | tkr. | 260 |
| **Rakstur í alt** | **tkr.** | **75.025** | **tkr.** | **73.046** | **tkr.** | **1.979** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn fíggjarkostnað** | **tkr.** | **13.215** | **tkr.** | **5.248** | **tkr.** | **7.967** |
| | | | | | | |
| §20 Rentustuðul | tkr. | 1.850 | tkr. | 2.000 | tkr. | -150 |
| §20 Rentuútreiðslur | tkr. | 1.100 | tkr. | 856 | tkr. | 244 |
| **Fíggjarkostnaður í alt** | **tkr.** | **2.950** | **tkr.** | **2.856** | **tkr.** | **94** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir** | **tkr.** | **9.895** | **tkr.** | **6.159** | **tkr.** | **3.736** |

**Á fundi, tann 23.09.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við omanfyristandandi fíggjarkarmi fyri 2025.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 30.09.2024

**Mál nr. 83/2024 – Íbúðarverkætlan Undir Høganesi – KBH ALMENT**
J.nr.: 1205-16-2024

Nes kommuna hevur boðið út jørð til íbúðarverkætlan Undir Høganesi. Nakrar byggifyritøkur vístu áhuga, men tá freistin at bjóða var farin tann 20.09.2024, var eitt boð innkomið frá KBH. Fundur var avtalaður við KBH, har teir fingu møguleika at leggja fram uppskotið.

Teirra uppskot snýr seg um tríggjar íbúðarbygningar við møguleika fyri bilhúsi/goymsluskúrðum omanfyri vegin. Íbúðirnar eru í tveimum støddum.

Vísandi til fundin á kommunuskrivstovuni, tann 27.09.2024, mæla tekniska deild og tekniska nevnd býráðnum til at fara víðari við uppskotinum hjá KBH og at geva teimum játtandi tilsøgn um hetta.

**Býráðið samtykti einmælt at geva KBH játtandi tilsøgn um at arbeiða víðari við uppskotinum.**